# Løgmaður skal hitta aðalstjóran í NATO



*Løgmaður skal í apríl hitta aðalskrivaran hjá Nato*

**POLITIKKUR**
*Tíðindaskriv*

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, skal eftir ætlan 12. apríl hitta aðalskrivaran í NATO, Jaap de Hoop Scheffer, á NATO- høvuðsborgini í Brússel. Jaap de Hoop Scheffer er ættaður úr Niðurlondum, og hann hevur røkt uppgávuna sum NATO-aðalskrivari síðan 2003.

Jóannes Eidesgaard verður annar løgmaður í røðini, ið fær høvið til at hitta ein NATO-aðalskrivara. Á sumri í 2003 vitjaði fyrrverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, táverandi NATO-aðalskrivaran, George Robertsson, á NATO-høvuðsborgini í Brússel.

Fundurin millum løgmanni og NATO-aðalskrivaran er komin í lag í samband við vitjanina hjá løgmanni í Evropasamveldinum í døgunum 10. til 13. apríl.

Umframt at hitta ES-myndugleikar og NATO-aðalskrivaran, er eisini greitt, at løgmaður fer at hitta aðalskrivaran í EFTA, William Rossier á síni vitjan í Brússel í komandi mánaði.

## Smærri mál fyri tað mesta

Løgreglan í Havn upplýsir at vikuskiftið hevur verið stak friðaligt. Teir hava verið sjónligir hetta vikuskiftið, og hava lourt nógv úti. Onkur tilkalling hevur tó verið, men vakthavandi sigur, at tað bert hava verið smærri mál.

## Konufólkabardagi

Fríggjakvøldið fekk løgreglan boð um, at ein bardagi var uttanfyri Ebenezer. Tá løgreglan kom á staðið sóu teir, at tað vóru tvær yngri kvinnur, ið bardust. Onnur hevði fingið ein fingur í eygað, og tískil tók løgreglan hana við út á skaðastovuna. Eingin teirra varð meldað í málinum, men løgreglan bað um frágreiðing, um so er, at onnur teirra meldar seinni, og sak verður.

## Rúsdrekkakoyring í Havn

Leygarnáttina um hálvgum trý tíðina varð ein maður tikin fyri rúsdrekkakoyring i Havn. Maðurin hevði sera høga promillu. Vaktahavandi sigur, at løgreglan hevur eyguni væl eftir bilførarum vikuskiftisnætur, og at teir ofta steðga bilum fyri at kanna, um førarin er ávirkaður.

## Húsaófriður

Leygarmorgunin vórðu boð send eftir løgregluni, um at koma at loysa eitt mál um húsaófrið. Løgreglan fekk tosað partarnar til rættis, og eingin varð handtikin í málinum. Báðir partar vóru verandi eftir í húsunum.

## Harðskapur

Sunnunáttina fekk løgreglan eina fráboðan um eitt harðskapsmál í Klubbagarðinum. Ein maður varð blivin skallaður í andlitið, og hann fekk skaða í nøsina. Løgreglan fekk fatur í gerningamannin, og avhoyrdi hann. Mál er skrivað, og tí verður tað avgjørt í rættinum.

## Herverk á Stórheyggi

Sunnudagin kom ein fráboðan um herverk á høllina á Stórheyggi. Tveir stórir rútar vóru knústir, tí onkur hevði tveitt grót inn ígjøgnum teir. Ilt er at gera nakað við tílík mál, og framvegis er eingin skuldsettur í málinum.

## Rúsdrekkakoyring í Kollafirði

Sunnukvøldið varð ein maður tikin í Kollafirði fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka. Vakthavandi veit ikki at siga hvussu høg promillan var, men hon var í ællum førum hægri enn loyvt.

-eys




**TOYOTA YARIS 1.0 TERRA V/KOMF. MMT GEAR** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DG 866 **KM:** 25.000
**Árgangur:** 30.05.03 **Seinast sýnaður:** 30.05.03
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - fjarstýrt sentral lás - fløguspælara.

**Kr. 118.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA 5D H/B AUT. GEAR** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** JH 264 **KM:** 56.000
**Árgangur:** 10.06.02 **Seinast sýnaður:** 10.06.02
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløgu spælara

**Kr.152.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1,8 LINEA SOL SED** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** RD 035 **KM:** 71.000
**Árgangur:** 06.11.01 **Seinast sýnaður:** 06.11.01
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - tokulyktir - Tónaður rútar aftan - Fløguspælara - Klimaanlegg Hiti í setrum framman - audiostýring frá róðrinum

**kr. 158.000,-**



**TOYOTA CAMRY 2,2 AUT. GEAR** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** JH 493 **KM:** 75.000
**Árgangur:** 17.06.99 **Seinast sýnaður:** 07.07.04
**Viðmerking:** Alufelgur - Klimaanlegg - Fartpilot - Radio/6 CD/Band - Elrútar/spegl - Hiti í setrum framman o.a.

**Kr. 148.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H\B**

**Skrásetingarnr.:** JL 741 **KM:** 112.000
**Árgangur:** 18.10.96 **Seinast sýnaður:** 18.02.04
**Viðmerking:** Radio við band spælara - Sentral lás

**Kr. 49.000,-**



**MITSUBISHI CARISMA 1,8**

**Skrásetingarnr.:** SG 548 **KM:** 86.000
**Árgangur:** 05.01.98 **Seinast sýnaður:** 25.11.03
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - fjarstýrt sentral lás - Aircondition - tokulyktir - hiti i setrunum

**Kr. 72.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,9 D LINEA TERRA SED** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** AG 787 **KM:** 115.000
**Árgangur:** 09.06.00 **Seinast sýnaður:** 04.03.04
**Viðmerking:** Sentrallás - fløguspælari - Elrútar framman - El-spegl

**Kr. 108.000,-**



**PEUGEOT EXPERT 2,0 VAN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SA 096 **KM:** 30.000
**Árgangur:** 17.05.00 **Seinast sýnaður:** 05.05.04

**Kr. 98.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA 5D H/B** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** JV 226 **KM:** 93.000
**Árgangur:** 28.02.02 **Seinast sýnaður:** 28.02.02
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløgu spælara

**Kr. 132.000,-**



**FIAT STILO 1,6** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TJ 583 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 11.07.02 **Seinast sýnaður:** 11.07.02
**Viðmerking:** Sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara - innstilling av fjarðum(City/ASK)

**Kr. 119.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F